Beinir Johannesen
Árni Skaale
Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
Bárður á Lakjuni
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til
Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Leingja gildistíðina á rættindum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verður í § 7, stk. 1 og 2 "1. januar 2034" broytt til: "1. januar 2035".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Tað hevur verið støðug framgond í fiskivinnuni, síðan sjófeingislógin endaliga varð samtykt í 2019.

Vit hava fingið fleiri nýggj skip, og hetta er heilt víst við til at gera okkara skipaflota meir effektivan og orkuvinarligan.

Tað er týdningarmikið, at skipanin er trygg, og at allir aktørar vita, hvat teir hava at halda seg til, soleiðis at okkara fiskivinna ikki skal liva við støðugun ótryggleika, sum tilfeldið var frá 2007 til 2019.

Tryggleiki hevur stóran týdning fyri íløguhugin og fíggingarmøguleikarnar.

Serligar viðmerkingar
Til § 1
Skotið verður upp at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 til 1. januar 2035. Veiðirættindi hava somu gildistíð sum veiðiloyvið.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2023

Beinir Johannesen	Bárður á Lakjuni	Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur